TILTØK

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Peter Prothero.
Leygardagin After Eight: Høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóna Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Samkoman Rhema
Mikukvøldið einki bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Mervin Gunaselvan av Sri Lanka talar. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 16 Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 14 Útferð í Havnadal (takið mat við). Um ikki viðrar verða vit í hølum Frelsunarhersins.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 14. juni kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

Ebenezer
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Vitjan av sangkórinum úr Calvary Bible Church.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Hans Chr. Johannesen
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúlaútferð, kl. 18 Møti v/ Alfred Hansen.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.30 Sangmøti á torginum í Runavík.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Peter Prothero., kl. 17 Barnamøti, kl. 21.30 Sangmøti í bygdarhúsinum á Strondum.
www.keldan.fo

Getsemane, Klaksvík
Sangkvøld við Jens Lisberg verður leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við André Matras. Tú ert hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin Sunnudagsskúlalega í Kunoy.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 20 Bíbil- bøn og lovsongsløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Magnus Jensen. Øll eru vælkomin.

Felagið Tórshavn
Hóskvøldið 12. juni verður kommunumark gingið: framvið Sandá úr Havnardali út til Altarshellu. Havið heit og góð gonguklæði við. Tilmelding.

Tilhaldið í Sandoynni
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 18. juni fara vit dagstúr. Vit fara úr skopun kl. 10.30 og halda leiðina til Elduvíkar, har vit eta døgurða í Lonini kl. 12.30. Á vegnum suður aftur vitja vit í Kvívík. Kostnaður fyri túrin er 250 kr. íroknað ferðina og mat. Enn eru nøkur pláss eftir. Tilmelding í Tilhaldinum ella á tlf. 361990.

Dagtilhaldið í Vági
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

Dagtilhaldið Fløvin
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Týsdagin 10. juni:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
Mikudagin 11. juni:
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur
Hósdagin 12. juni:
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldurprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 13. juni:
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altið ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, við hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61 655400.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin,ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

BRÚKARASAMTAKIÐ
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvennjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

Føroya Heimavirksifelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarblað til Heimavirksleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

LISA
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøriki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Heilaskaðaráðgeving
Hevur tú spurningar um heilaskaðar, afturvennjing ella annað, so ber til at skriva til okkara á "NeuroCom, FO 400 Oyrarbakki", at senda teldupost til:
info@neurocom.dk ella at ringja til 225 263.
NeuroCom, Oyrarbakki

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Javni
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929
fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

BRÚDLEYP

Hósdagin 5. juni *giftust* í prestagarðinum í Klaksvík Vima Hanusardóttir Hansen og Jóanes Leivsgarð.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Anita Simonsen og Herálv Jensen av Sandi. Veitslan verður í Virkinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 361920, 361111, 361484 í seinasta lagi 14. juni.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Klaksvík, Vígdis Kristiansdóttir og Jógvan Skorheim, bæði úr Klaksvík. Veitslan verður kl. 19.00 á Hotel Norð á Viðaroyði. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 455931, 224921, 455553 ella 221849 í seinasta lagi 1. juli.

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast í Hvalbiar kirkju Poula Næs, Hvalba og Rúni Thomsen, Froðba, búsitandi á Eiði. Vælkomst verður í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma til veitsluna, verða biðin um at siga frá á tlf. 423393 ella 221133 innan 7. juli 2003.

SILVURBRÚDLEYP

Tann 19. juli halda Sunrid og Kristian Martin Jacobsen, Hósvík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í veitsluna verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 422386 ella 212386 í seinasta lagi tann 6. juli.

Reytt, blátt og grønt eyðkenna nýggja Vertshúsið í Havn

Vertshúsið er einki minni enn eitt satt listaverk innan. Nú er tað so opið fyri almenninginum

VERTSHÚSIÐ LATIÐ UPP
Nýggj býarmynd
Jan Müller

Í gjár varð fyrsta roynd gjørd at bjóða fólki innar í nýggja Vertshúsið í Niels Finsensgøtu í Havn. Johan Mortensen, stjóri sigur, at teir nú í eina tíð hava arbeitt við at fáa alt uppá pláss. Hølini innan eru varðveitt í sínum uppruna men hevur listamaðurin Tróndur Patursson lagt litir á veggir og loft og sett upp ymisk listaverk úr glasi í hølunum, soleiðis at tey nú minna ikki sørt um eitt stórt samanhangandi innandura listaverk. Johan Mortensen er ótrúliga fegin um tað arbeiði, sum listamaðurin hevur gjørt og vísir á, at Tróndur fer eisini at hava eina fasta framsýning í húsunum.

Annars eru øll loyvi fingin uppá pláss og eisini skonkiloyvi. – Vit hava roynt at bjóða fólki innar fyri at vita, hvussu riggar og um nakað skal broytast. Nú eru vit við at vera heilt klár til at bjóða almenninginum innar. Húsini lótu tó upp í gjár men verða tey fult opin frá mánadegnum í næstu viku.

Umframt at hava alment opið so verður eisini roynt at brúka hølini til samkomur, móttøkur ol.



Myndir: Jan Müller

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Hósdagin 12.06. kl. 22[00]

Hósdagin 12.06. kl. 19[30]

Hósdagin 12.06. kl. 19[45]
– Seinasta sýning

Hósdagin 12.06. kl. 21[30]

KOMANDI FILMUR

Frumsýning
Fríggjadagin 13.06. kl. 21[30]
Fríggjadagin 13.06. kl. 23[30]

Stórt úrval av DVD-filmum til søluv